# Størsti poppari í Føroyum nakrantíð



**Hann hevur selt meira enn 200 milliónir fløgur og telist millum mætastu poppkomponistar í Bretlandi. Nú kemur Robin Gibb til Føroya at syngja allar teir kendu sangirnar hjá Bee Gees, sum í hesum døgum verða heiðraðir kring allan heimin við serligum jubileum. Hetta verður kanska mest legendariska konsert í Føroyum nakrantíð**

Fríggjakvøldið bjóðar Bee Gees-sangarin Robin Gibb eitt heilt serligt kvøld við øllum teimum kendu sangunum hjá Bee Gees . Við meira enn 200 milliónum seldum fløgum telist Bee Gees millum mest seljandi bólkarnar í tónleikasøguni, og teirra sangskattur verður mettur sum tann næststørsti í poppsøguni – bert tikin av The Beatles.

Robin Gibb fer at syngja øll tey stóru hittini hjá Bee Gees saman við sínum væl spælandi og væl mannaða bólki. Lagt er upp til eina gandakenda konsert við nøkrum av størstu hittunum í poppsøgunum sungin av manninum, sum hevur verið við til at skapt og sungið tey upprunaliga.

- At vit hava fingið Robin Gibb at spæla á Summar Festivalinum er ein tann størsta hendingin í søguni hjá festivalinum. Hetta er ein av høvuðsmonnunum úr einum av heimsins størstu tónleikabólkum nakrantíð og eitt ordans scoop fyri Summar Festivalin og føroyska tónleikasummarið, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum av Summar Festivalinum.

### Framvegis nummar 1

Robin Gibb er ein av trimum Gibb-beiggjum í bólkinum Bee Gees. Robin Gibb hevur sungið og skrivað sín part av Bee Gees-hittunum, sum hava selt meira enn 200 milliónir plátur kring heimin. Harafturat hava sangir hjá Bee Gees, sungnir av øðrum sangarum, selt milliónir av plátum.

Heili 60 sangir hjá teimum hava verið á hittlistum kring heimin, og hittini hjá Bee Gees eru eisini aktuell. Ein nýggj innspæling av sanginum Islands In The Stream var fyrr í ár nummar 1 í Bretlandi, og tað hevur við sær, at Bee Gees hevur havt sangir ovast á bretska hitlistanum í fimm ártíggjundum.

Bee Gees eru eisini millum fremstu bólkar í heiminum, tá tað kemur til sølu av tónleiki. Ein amerikanskur felagsskapur hevur gjørt upp, at bert Elvis Presley, The Beatles, Michael Jackson, Garth Brooks og Paul McCartney hava selt meira fløgur enn Bee Gees.

### Óvanliga populerir

Bee Gees góvu sína fyrstu plátu út í 1965. Síðani kom ein røð av væl umtóktum útgávum, og síðst í 70'unum vóru Bee Gees so populerir, at teir eitt skifti høvdu 5 sangir millum 10 teir ovastu sangirnar á amerikanska single hitlistanum – eitt óhoyrt bragd.

Bee Gees gav sína seinastu fløgu út í 2001, og tvey ár seinni gavst bólkurin at spæla, tá Maurice Gibb doyði brádliga. Síðani hava Robin og Barry Gibb tó verið virknir tónleikarar, og teir hava hvør í sínum lagi spælt konsertir við Bee Gees sangum.

Í ár verður 50 ára jubileumið hjá Bee Gees hildið, og seinni í ár kemur serliga Bee Gees savnsfløga út í sambandi við hetta jubileum. Eisini verða fløgur givnar út, har teir fýra Gibb-brøðurnir eru í fokus á hvør sínari útgávu.

Og tá ið Robin Gibb fer á pallin á Summar Festivalinum fríggjakvøldið, verður tað mest seljandi tónleikarin, sum nakrantíð hevur sungið í Føroyum. Og tað verður kanska mest legendariska konsertin í Føroyum nakrantíð.

**Robin Gibb er mest seljandi tónleikarin, sum nakrantíð hevur spælt í Føroyum. Saman við beiggjum sínum í Bee Gees seldi hann meira enn 200 milliónir fløgur**